# Tilmæli um at greiða karmarnar um kommunala eftirlitið – skipanarligа

Løgmálaráðið, novembur 2025

# Fororð

Hendan frágreiðingin, og tilmælini, ið mælt verður til, taka støði í vitan, royndum, og lógargrundarlagnum fyri økið, umframt samrøðum við áhugapartar. Áhugapartarnir eru bæði núverandi eins og fyrrverandi starvsfólk, sum hava virkað innan økið síðani ár 2000, umframt umboð fyri Gjaldstovuna og Kommunufelagið.

Frágreiðingin kemur við boði uppá einfaldar loysnir, sum eftir eitt stutt tíðarskeið, kunnu hava stóra ávirkan, í mun til at fáa greiðar karmar um kommunala eftirlitið framyvir.

# Innihaldsyvirlit

Fororð ..... 2
1.0 Inngangur ..... 4
2.0 Søguligt baksýni ..... 6
2.1 Gongdin í stuttum, skipanarliga ..... 6
2.2 Kommunala virkisøkið ..... 6
3.0 Hvussu hevur eftirlitið virkað hetta tíðarskeiðið ..... 8
4.0 Hvat er eitt nøktandi eftirlit í mun til at røkja eftirlitsskylduna sambært Kommnustýrislógini..... 10
5.0 Hvørjir fyrimunir og vansar eru við verandi skipan ..... 13
6.0 Út frá omanfyri standandi gera tilmæli um, hvussu kommunala eftirlitið framyvir verður skipað, undir hvørjum myndugleika, ella myndugleikum. ..... 16
7.0 Eru onnur viðurskifti, sum hava týdning, í mun til tað skipanarliga, at taka tað við. ..... 17
8.0 Fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar av tilmælunum. ..... 18

# 1.0 Inngangur

Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur sett sær fyri at greiða karmarnar um kommunala eftirlitið í Føroyum. Eftirlitið við kommununum er eitt rættargildiseftirlit, ið hyggur eftir, at galdandi lóggáva verður hildin.

Eftirlitið fevnir eitt nú um ólógligar avgerðir, ið kommunustýrið hevur tikið, og avgerðir, sum kommunustýrið hevur skyldu til at taka sambært lóg. Eftirlitið kann verða framt av sínum eintingum og er ikki treytað av einumhvørjum skumpi uttanífrá, men tað kann fara til verka av sínum eintingum. Orsøkin til, at farið verður til verka kann eitt nú vera ein áheitan frá einum borgara, eini fyritøku, frá minnilutanum í kommunustýrinum ella frá einum øðrum myndugleika, ella tí at eftirlitsmyndugleikin gjøgnum fjølmiðlarnar gerst varugur við eitthvørt mál, ið eigur at verða viðgjørt.  Tó hevur ein áheitan ikki altíð við sær, at eitt eftirlitsmál verður sett í verk.

Kommunala eftirlitið, í núverandi líki, hevur 25 ár á baki. Í hesum tíðarskeiði eru hendar broytingar, í býtinum millum land og kommunur, harundir í uppgávubýtinum av samfelagsuppgávunum. Tað at broytingar henda, er ikki ónatúrligt í sjálvum sær, men størri broytingar, umframt samfelagsliga- og tøkniliga menningin ger, at tørvur er á at fáa greitt karmarnar fyri kommunala eftirlitið.

Í hesum sambandi bleiv ein arbeiðsbólkur settur at skriva eitt tilmæli til landsstýrismannin við boði uppá tiltøk fyri at fáa greitt karmarnar um kommunala eftirlitið.

*Arbeiðssetningurin*

Sum útgangsstøðið fekk arbeiðsbólkurin til uppgávu at gera eina støðulýsing av kommunala eftirlitinum frá ár 2000, harundir  hvat hevur virkað væl, og hvat hevur virkað minni væl, og lýsa hví.

Arbeiðsbólkurin skuldi lýsa:

- Hvussu hevur kommunala eftirlitið verið skipað síðani ár 2000.
- Hvussu hevur eftirlitið virkað hetta tíðarskeiðið í mun til ásetingarnar í kommunustýrislógini.
- Hvat er eitt nøktandi eftirlit í mun til at røkja eftirlitsskylduna sambært Kommnustýrislógini.
- Hvørjir fyrimunir og vansar eru við verandi skipan.
- Út frá omanfyristandandi gera tilmæli um, hvussu kommunala eftirlitið framyvir verður skipað, undir hvørjum myndugleika, ella myndugleikum.
- Eru onnur viðurskifti, sum hava týdning, í mun til tað skipanarliga, at taka tað við.
- Fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar av tilmælunum.

Arbeiðssetningurin skuldi svarast stutt og greitt. Ætlanin var ikki at skriva eitt langt álit, men at gera eitt stutt tilmæli á umleið 12 síður, umframt møgulig fylgiskjøl, til støðutakan hjá landsstýrismanninum.

*Avmarkingar*

Uppgávan er avmarkað til at snúgva seg um at gera eina ætlan fyri, at greiða karmarnar um kommunala eftirlitið, í mun til tann skipanarliga partin, at fyrisita kommunala eftirlitið. Tað vil siga, at uppgávan er ikki at dagføra ella endurskoða kommunustýrislógina.

Tað kunnu vera tilmælir, sum hava fyrisitingarligar avleiðingar, herundir møguliga lógarbroyting. Hetta er ikki endamálið í sjálvum sær við verkætlanini.

***Stýrisbólkur:***
Hesi eru vald í stýrisbólkin:

| | |
|---|---|
| Fyri Løgmálaráðið, | Nella Festirstein, aðalstjóri og forkvinna í stýrisbólkinum. |
| Fyri Fíggjarmálaráðið, | Bjarni Askham Bjarnason, aðalstjóri. |

***Arbeiðsbólkur:***
Hesi eru vald í arbeiðsbólkin:

| | |
|---|---|
| Fyri Løgmálaráðið, | Turid Arge, ráðgevi, samskipari |
| | Jógvan Martin Joensen, fulltrúi. |
| Fyri Fíggjarmálaráðið, | Djóni Højgaard, fulltrúi. |

Omanfyri standandi arbeiðið byrjaði tann 27. mars 2025 við tíðarfreist til í oktober 2025.

## 2.0 Søguligt baksýni

### • 2.1 Gongdin í stuttum, skipanarliga

Galdandi kommunustýrislóg kom upprunaliga í gildi við løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000. Lógin varð seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22 mai 2023.

Kommunala eftirlitið hevur, hesi 25 árini, verið fyrisitið í einum aðalráði. At byrja við, varð lógin og tær heimildir landsstýrismaðurin hevur, sambært kommunustýrislógini, fyrisitið í einum og sama aðalráði, hjá einum landsstýrisfólki. Í dag varðar landsstýrismaðurin í lógarmálum av rættargildiseftirlitinum, meðan tað er landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, sum varðar av tí fíggjarliga eftirlitinum, sambært galdandi fráboðan um málsøkjabýti.

Í 2004 varð § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini flutt frá landsstýrismanninum í innlendismálum, sum hevði kommunumál, til landsstýrismannin í fíggjarmálum við fráboðan nr. 12 frá 1. apríl 2004 um málsøkjabýti. Hetta eru ásetingar um góðkenning frá landsstýrismanninum tá ið ásetingar í sáttmálum og avtalum um lønar- og setanarviðurskifti fyri kommunal starvsfólk, ikki eru greitt ásett í sáttmála ella avtalu.

Í 2008 vóru fleiri heimildir hjá landsstýrismanninum í innlendismálum, sum varðaði av kommunumálum, fluttar til landsstýrismannin í fíggjarmálum við fráboðan nr. 3 frá 18. februar 2008. Hetta førdi við sær, at kommunala eftirlitið bleiv býtt sundur. Tær heimildirnar sum vóru fluttar vóru:

- § 9, stk. 1-3 um heimild at áseta nærri reglur um samsýning til kommunustýrislimir
- § 43, stk. 2, § 46, stk. 2 og § 47 um fíggjarliga umsiting í kommununum
- § 52, § 53, stk. 2 og § 54 um ábyrgdarbindingar, veðhald o.l. v.m., og eftirlitsskyldur hjá landsstýrismanninum við fíggjarligu viðurskiftum, og viðvíkjandi hámarki fyri nettoskuld.

Hóast at eftirlitið øll hesi árini hevur verið, og framvegis er, ein uppgáva, sum liggur beinleiðis undir landsstýrisfólkinum í einum aðalráði, er tíðin búgvin til, at tað verður endurhugsað. Her meinast serliga við tey skipanarligu viðurskiftini, so sum spurningin um, hvørt eftirlitið framvegis skal verða innanhýsis í aðalráðnum, ella um tað skal skiljast út til ein annan myndugleika, og um fíggjarliga- og rættargildiseftirlitið framvegis skulu verða sundurbýtt.

### 2.2 Kommunala virkisøkið

Fyri at fáa eina mynd av, hvør týdningurin er av einum kommunalum eftirliti, er neyðugt at lýsa hvat kommunurnar eru, og hvat tær gera.

Kommunala virkisøkið er broytt nógv síðani 2000, tá kommunustýrislógin kom. Kommunur skulu í dag liva upp til fleiri lógarkrøv um t.d. drekkivatn og kloakering, sum kommunur áður hava veitt eftir besta førimuni. Harafturat hava kommunur yvirtikið fleiri stór vælferðarøki frá landinum. Í 2000 yvirtóku kommunurnar barnaansingarøki og í 2005 barnavernd. Í 2015 yvirtóku kommunurnar eldraøkið og heimarøktina.




Kelda: Hagstova.fo og egnar útrokningar

Tað sæst, tá hugt verður eftir hvussu stórar almennu nýtsluútreiðslurnar eru býtt á geira, at kommunurnar fylla støðugt meira av tí almenna. Meðan landsins partur er fallandi eru kommunalu [1]nýtsluútreiðslunar nærum tvífaldaðar, í mun til samlaða búskapin í Føroyum.

Sambært niðanfyri, talvu 1, kostaðu nýggju kommunalu økini kommunum nærum hálva aðru milliard í 2024, svarandi til knøpp 40% av kommunala búskapinum.

| | roknskapur 2024 |
|---|---|
| Barnavernd | 104.900.756 |
| Eldrarøkt | 712.504.891 |
| Barnaansing | 652.661.163 |
| | 1.470.066.809 |
| partur av samlaðu kommunalu útreiðslunum | 39% |

Talva 1, kelda: búskaparskipan landsins

Eitt er at nýggju økini fylla nógv, men fyrisitingarliga er tað munur á siðbundnu kommunalu uppgávunum og nýggju økinum, sum er at veita vælferðartænastur beinleiðis til borgararnar.

[1] Nýtsluútreiðslur eru í hesum høpi beinleiðis framleiðsluútreiðslur. T.v.s. lønir til starvsfólk, keyp av vørum og tænastum og líknandi. Útreiðslur til veitingar, sum pensjónir og líknandi eru ikki við í tølunum.

Krøvini til kommunalu fyrisitingina eru tí størri í dag, enn tey vóru fyri 25 árum síðani. Tá er nærliggjandi at siga, at um tørvur var á kommunalum eftirliti í ár 2000, er tann tørvurin minst líka stórur í dag.

## 3.0 Hvussu hevur eftirlitið virkað hetta tíðarskeiðið

Sum áður nevnt, hevur kommunala eftirlitið, øll hesi mongu árini, verið fyrisitið í einum aðalráði, og er hetta framvegis soleiðis. Kommunala eftirlitið verður fyrisitið í Løgmálaráðnum, sum er eitt nýtt aðalráð, skipað frá desember 2022, eftir valið seinast. Tey seinnu mongu árini er málsøkið flutt til annað aðalráð enn upprunaliga, tá val hevur verið, og nýggj samgonga er skipað.

Kommunala eftirlitið hevur, síðani ár 2000, virkað soleiðis at tey starvsfólk, ið sita við kommunumálum, taka upp mál av sínum eintingum, ella við grundarlagi í einari áheitan. Í stóran mun hava tey málini, sum verða tikin upp, verið mál sum eftirlitið dettur framá, mótsett einari proaktivari og væl skipaðari tilgongd.

Vanliga hevur tað verið soleiðis, at tey starvsfólk, sum arbeiða við kommunumálum, arbeiða samstundis við fleiri øðrum tíðarkrevjandi málsøkjum, sum ikki hava nakað við kommunumál at gera.

*Starvsfólkaorkan - gongdin*

Málsøkið er við broytingini í 2022 farið frá, at vera upprunaliga gott 2 ársverk ársverk til um 1 ársverk, í rættargildiseftirlitinum (legalitetseftirlitinum), sum er hjá Løgmálaráðnum. Hjá Fíggjarmálaráðnum hevur eftirlitið í stóran mun verið knýtt at einum persóni, sum hevur aðrar uppgávur, sum fylla støðugt meira. Hetta er samstundis, sum vavið av uppgávum hjá kommunum er økt munandi, serliga eftir at týðandi økir eru flutt frá landi til kommunur, at taka sær av. Her verður serliga hugsað um eldraøkið og heimarøktin.

Talva nr. 2: Yvirlit yvir ársverk, kommunumál, árini 2000-2025

| Ár | Aðalráð | Starvsfólk/ársverk | tús.kr. | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| 2000 | Innlendismálaráðið | 2,0 ársverk | 1.414 | Upphæddin er tann, sum varð flutt til Almannamálaráðið, við Fíggjarlógini 2014, frá Innlendismálaráðnum, sum var tikið av. Tískil verður tað nýtt sum útgangsstøðið. Mett er, at tað er besta boðið. (Nota 1) |
| 2008 | Fíggjarmálaráðið, fíggjarligi parturin | 1,0 ársverk | | Eingin játtan varð flutt frá Innlendismálaráðnum til Fíggjarmálaráðið, í hesum sambandi. |
| 2013 | Almannamálaráðið | 2,0 ársverk | 1.414 | Sambært uppskoti til FLU 2014 frá www.Logting.fo viðvíkjandi §12 Almannamál, varð upphædd 1.414 tús. kr. flutt frá Innlendismálum. Tað framgongur av uppskotinum, at 1.259 tús.kr. er lønir (stkt. 11) og 155 tús. kr. er rakstur (stkt.14). (Nota 2) |
| 2015 | Heilsu- og innlendismálaráðið | 2,0 ársverk | 1.188 | Sambært uppskotið til FLU 2016 á heimasíðuni hjá FMR, leinkja samlað-flu2016.pdf so sæst undir §12 Almannamál, Almannamálaráðið, at tað eru fluttar 1.188 tús. kr. til Heilsumálaráðið vegna málsøkir, |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | sum eru flutt, herundir kommunumál. (1.098 tús. kr. (stkt. 11, og 98 tús. kr. (stkt. 14) |
| 2019 | Umhvørvis- og vinnumálaráðið | 2,0 ársverk | 1.414 | Støðið er tikið í løn í 2020 fyri tvey ársverk. Fyri málsøkið kommunumál, umframt rakstur, meting.<br><br>Lønarsáttmálar TMF 2019, og BLF 2019. Hetta gevur um 1,4 mió. kr. Tískil er talið frá 2013 nýtt. |
| 2022 | Løgmálaráðið | 1,0 ársverk | 630 | Tað framgongur ikki av fíggjarlógarteksti, hvat er flutt hvar. Tískil verður støðið tikið í, hvat í løtuni verður nýtt av ársverkum í Løgmálaráðnum til málsøkið kommunumál sambært notu 1. Um eitt ársverk varð flutt frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, umframt meirjáttan, umleið 0,335 nýtt ársverk. |

**Nota 1: Málsøkið kommunumál fevnir, í hesum føri, sambært fráboðan nr. 115, dagfest tann 19. september 2013 um hesar lógir:**
Ll. nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur.
Ll. nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting, tó ikki § 15, stk. 2 og § 16, stk. 1 og 2.
L. nr. 458 af 30. juni 1993 om folketingsvalg på Færøerne, § 8, stk. 2, § 9, stk. 1 og § 20.
Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), tó ikki § 5, stk. 5, § 9, stk. 1, 2 og 3, § 43, stk. 2, § 46, stk. 2, § 47, § 52, § 53, stk. 2 og § 54.
Ll. nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.
Ll. nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. **(komið afturat økinum við lógini í 2014)**

1) Sbr. heimastýrislógini lista A, nr. 2: Kommunal mál. Harundir hoyra stjórnan av kommununum og eftirlit við teimum, undantikið fíggjar, íløgu og lønarviðurskifti í kommunum.
2) Sbr. heimastýrislógarinnar lista A, nr. 1: Lóg um løgtingsval."

Harumframt hava útoyggjamál, núverandi høvuðskonta hjá Løgmálaráðnum, HK 14.37.2.19. Stuðul til útoyggjamenning (Stuðulsjáttan) verið partur av økinum. Tá økið varð flutt frá Innlendismálum í 2013, var hetta partur av teimum málsøkjum, sum vórðu flutt, saman við kommunumálum.

**Nota 2:** Trupult at nýta starvsfólkayvirlitið í fíggjarlógaruppskotinum, tí broytingar kunnu vera yvirskipað. Men tað, sum er upplýst er, at tvey ársverk vórðu flutt.

Samanumtikið hevur kommunala eftirlitið virkað eftir førimuni. Seinnu árini í skiftandi aðalráðum, við skiftandi og stigvís minni arbeiðsorku. Sum talva 2 vísir, vóru tað í 2008 um 3 ársverk samlað í kommunala eftirlitinum. Í dag er tað samlað undir 1 ársverk, sum røkir kommunala eftirlitið. Hetta er somuleiðis, sum vavið á uppgávum hjá kommununum er vaksið alsamt, sum umrøtt í parti 2.2.

## 4.0 Hvat er eitt nøktandi eftirlit í mun til at røkja eftirlitsskylduna sambært Kommunustýrislógini

Kommunala eftirlitið er eitt legalitetseftirlit, ið hevur eygað fyri, at kommunurnar fyrisita eftir galdandi lóggávu og játta og seta upp roknskap eftir galdandi reglum. Kommunurnar virka sjálvstøðugt og eru ikki undirlagdar landsins fyrisiting. Heimildirnar hjá eftirlitinum eru eisini avmarkaðar. Er ivamál um tað, sum kommunur gera er lógligt, er tað í síðsta enda upp til dómsvaldið at gera av, um hetta er so.

Men kommunur virka sambært lógum, sum løgtingið setur og tí er kommunali bygnaðurin og karmarnir, sum kommunurnar virka undir eisini eitt landspolitiskt mál, sum politiska skipanin eigur at fyrihalda seg til.

Kommunurnar hava rætt at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landstýrisins sum ásett í løgtingslóg, sbrt. § 56 í stýriskipanarlógini. Eftirlitið við kommununum, sum er ásett í § 48 í løgtingslóg um kommunustýri (kommunustýrislógin), verður í høvuðsheitum ført av Løgmálaráðnum, tó at Fíggjarmálaráðið varðar av eftirlitinum av ymiskum fíggjarligum viðurskiftum, eitt nú lániheimildum, lønarviðurskiftum og roknskaparviðurskiftum.

*Lóggáva*
Stýrisskipanarlógin § 56 ásetur:

> "Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m."

Kommunustýrislógin § 48, stk. 1 ásetur:

> "Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við kommununum og kommunalum samstørvum."

Í serligu viðmerkingunum til § 48 stendur soleiðis um rættargildiseftirlitið:

> "Vavið av rættargildiseftirlitinum er ikki bert avmarkað til ólógligar avgerðir og samtyktir í sambandi við málsviðgerð og tílíkt, men fevnir eisini um kommunal skipanarviðurskifti. Útinnan av einum virknum rættargildiseftirlitið treytar, at støðið ikki einans verður tikið í løgtingslógum og kunngerðum, men eisini í kommunustýrisskipanum, fundarskipanum og starvsfólkaskipanum, sum kommunustýrini hava samtykt. Við í hesum er, at rættargildiseftirlitið skal kanna um áður nevndu skipanir, ið kommunustýrini hava samtykt, eru í andsøgn við skrivaða og óskrivaða lóg. Eftirlitið kann uttan serstaka lógarheimild brúka óbindandi ummæli. Hetta kann serliga hugsast, at hava týdning í sambandi við fyrispurningar um, hvussu tær kommunalu, rættarligu reglurnar skulu skiljast og tá fyrst og fremst viðvíkjandi kommunustýrislógini og innihaldinum í kommunufulltrúini."

Sambært ásetingini er eitt nøktandi eftirlit í mun til løgtingslógina um kommunustýri soleiðis treytað av, at eftirlitið skal taka hædd fyri bæði løgtingslógum og kunngerðum, eins og teimum kommunalu skipanarviðurskiftunum.

Í mun til óbindandi ummæli og fyrispurningar, so eigur tað kommunala eftirlitið sum liður í eftirlitsuppgávuni at hava eina vegleiðandi og ráðgevandi funktión, og ynskiligt er, um hetta verður brúkt oftari og í størri mun.

*Virkanarháttur*
Í mun til virkanarháttin hjá einum nøktandi eftirliti, kann hetta flokkast í fýra yvirskipaðar bólkar. Hesir eru:

1. Kunning og ráðgeving
2. Avgerðir, siðvenja og tulkingar
3. Nýtsla av heimildum at seta tiltøk í verk
4. Ymiskt um at føra eitt betri eftirlit

*1. Kunning og ráðgeving*
Við at veita góða kunning og ráðgeving til kommunur, kann tað kommunala eftirlitið hava ein fyribyrgjandi virknað. Somuleiðis kann tað henda, at færri skeivar avgerðir verða tiknar hjá kommununum, um kommunurnar hava betur møguleika til at spyrja seg fyri. Tað er týdningarmikið at kommunala eftirlitið leggur seg eftir at gera viðkomandi vegleiðingar, sum kommunur hava atgongd til. Tað er somuleiðis týdningarmikið hjá kommunala eftirlitinum at vera varugt við, at fleiri av kommunalu fyrisitingunum í Føroyum eru smáar, og tískil ikki rúma eitt nú løgfrøðiligari servitan, og harumframt at avgerðir og samskiftið, í ein vissan mun, má fyriganga á einum brúkarastøði.

*2. Avgerðir, siðvenja og tulkingar*
Nógv praksis hjá kommununum í Føroyum fyrigongur eftir siðvenju. Ført verður fram, at kommunala eftirlitið eigur at taka serføroysk viðurskifti til eftirtektar í sínari málsviðgerð.

Í mun til avgerðir, siðvenjur og tulkingar eru ymiskar fatanir um, hvørt tað møguliga er ov nógv sambæri við danska praksis í tí føroyska kommunala eftirlitinum.

Tískil er tað sera týdningarmikið, at tað kommunala eftirlitið hevur eitt samanhangandi og fullfíggjað avgerðarsavn, ikki bara fyri núverandi avgerðir, men allar avgerðir síðani ár 2000. Á henda hátt gerst lættari at halda skil á menningini í praksis, soleiðis at serføroysk viðurskifti ikki viðføra manglandi rættartrygd. Eitt tílíkt avgerðarsavn, saman við vegleiðingum, stimbrar um fyrisitingina av økinum, soleiðis at eftirlitið verður minni persónstengt, og stuðlar undir at styrkja og vegleiða fyrisitingarnar hjá kommununum. Eitt fullfíggja avgerðarsavn, er soleiðis eitt amboð sum stuðlar undir at føra eitt nøktandi eftirlit.

Harumframt er tørvur á einum orðaskifti um rættarstøðuna í Føroyum, og hvussu tað kommunala eftirlitið eigur at verða ført við atliti til serføroysk viðurskifti.

3. *Nýtsla av heimildum at seta tiltøk í verk*

Sambært kommunustýrislógini hevur kommunala eftirlitið m.a. heimild at ógilda og fyribils taka avgerðir av, at áleggja kommunustýrislimum tvingsilsbøtur, og at saksøkja kommunustýrislim eftir endurgjaldi, umframt at heita á ákæruvaldið at sekta kommunustýrislim við bót.

Kommunala eftirlitið hevur sostatt neyðugu heimildirnar til at føra eitt nøktandi eftirlit, um tílík viðurskifti eru í kommununi sum krevja at omanfyri nevndu amboð verða tikin í nýtslu. Ein fortreyt fyri nýtslu av amboðunum er, at kommunala eftirlitið hevur ta neyðugu fakligu styrkina og orkuna.

4. *Ymiskt um at føra eitt betri eftirlit*

Tað hevur týdning at kommunala eftirlitið er forvirkið og væl skipað. Hetta viðførir eitt meira viðkomandi eftirlit, sum til dømis kann leggja dent á fokusøkir í skiftandi tíðarskeiðum. Hetta er galdandi fyri bæði rættargildis- og fíggjareftirlitið.

Skjót og dygdargóð málsviðgerð eigur at verða raðfest, tí langar svartíðir kunnu viðføra at kommunurnar ikki venda sær til Kommunala eftirlitið, tí at *tær "ræðast tankan um at standa í spagat í viku- og mánaðarvís".* Ein avleiðing av hesum kann vera, at kommunur, í staðin fyri at venda sær til kommunala eftirlitið, loysa støðuna eftir besta førimuni. Hetta kann eitt nú verða har serstakt loyvi krevst frá kommunala eftirlitinum, eitt nú um undantaksloyvi til sølu av kommunalari fastogn uttan alment útboð. Áhugapartar føra til dømis fram, at "*eitt svar frá Kommunala eftirlitinum, sum kemur skjótt, er betri enn eitt seint, men langt og vælorðað svar.*"

Fyri at lætta um málsviðgerðina er tað týdningarmikið at kommunala eftirlitið hevur greiðar rætningslinjur og innanhýsis mannagongdir.

*Samanumtøka*

Eitt nøktandi kommunalt eftirlit eigur at hava ein kunnandi og ráðgevandi leiklut, eins og ein meira forvirknan leiklut, eitt nú við útvaldum fokusøkjum. Vegleiðingar, innanhýsis mannagongdir til málsviðgerðina, og eitt fullfíggja avgerðarsavn stuðla undir greidleika í málsviðgerðini, og gera økið minni persónstengt. Vegleiðingar og avgerðarsavn kunnu somuleiðis vegleiða og styrkja fyrisitingarnar hjá kommununum, soleiðis at rættartrygdin í kommununum ikki er treytað av kommunala eftirlitinum, í líka stóran mun.

## 5.0 Hvørjir fyrimunir og vansar eru við verandi skipan

Tá talan er um fyrimunir og vansar í mun til hvønn myndugleika eitt kommunalt eftirlit skal leiðast av, er hetta knýtt at ymiskum viðurskiftum.

Viðvíkjandi leiðslu og skipan av administrativum uppgávum hjá tí almenna, er tað vanliga ikki nøkur loysn, sum er meira røtt ella meira skeiv enn ein onnur, men undir nøkrum fyritreytum, kunnu vera fyrimunir og vansar. Undantikið er, um tað er lógarásett hvar, hvussu og av hvørjum uppgávan skal loysast. Viðvíkjandi kommunala eftirlitinum er eingin lógaráseting, um skipan av eftirlitinum.

Grundleggjandi er tó, at orkan at skipa og loysa uppgávurnar er til staðar, at økið verður raðfest.

Skipan av eftirlitinum.

Í mun til skipanina av kommunala eftirlitinum, eru møguleikarnir í høvuðsheitinum hesir:

1. Tað rættargildiga og tað fíggjarliga eftirlitið verða framhaldandi skipaði hvør sær, hjá hvør sínum myndugleika, eins og eftirlitini eru skipaði í dag.
2. Farið verður aftur til ta upprunaligu skipanina, har kommunala eftirlitið verður skipað sum ein samlað eind undir einum og sama myndugleika.
3. Eftirlitið verður ein samlað eind undir aðalráðunum, men skipað sum ein serstøk deild.
4. Kommunala eftirlitið verður skilt út úr aðalráðunum, og gerst ein sjálvstøðugur stovnur, ella ein partur av einum verðandi stovni.

1. *Verandi skipan (Innanhýsis men sundurbýtt eftirlit)*

Verður hildið fast við verandi skipan, merkir tað at tað fíggjarliga- og rættargildiga eftirlitið framvegis verða hvør sær. Ein grundgeving fyri hesum skipanarhátti er, at tað fíggjarliga- og rættargildiga eftirlitið eru so mikið ymisk, at hesi møguliga ikki rúmast væl saman. Hinvegin, so eiga tað fíggjarliga og rættarliga eftirlitið at vita av hvørjum øðrum, ið inniber, at eftirlitini megna at virka saman uttan at órógva hvørt annað.

Hartil er tað skynsamt, av praktiskum orsøkum, at tað fíggjarliga eftirlitið liggur í Fíggjarmálaráðnum, tí hetta gevur málsviðgerunum atgongd til neyðuga vitan. Í Fíggjarmálaráðnum er ein leypandi viðgerð av játtanarligu og roknskaparligu viðurskiftunum hjá landinum, sum eru eins viðkomandi fyri kommunala geiran. Tískil er tað skynsamt, at málsviðgerðin fer fram í tí umhvørvinum.

Eisini er týdningarmikið, at samstarvið millum tað fíggjarliga og rættargildiga eftirlitið gerst betri, uttan mun til, hvussu ein velur at skipa eftirlitið annars. Hetta kann gerast við at skipa regluligar fundir

millum eftirlitini við fastari dagsskrá. Á hendan hátt kunnu eftirlitini vita av hvørjum øðrum, og samskipa eftirlitsuppgávurnar sínámillum, og fyribyrgja at eftirlitismál, sum eiga at verða tikin upp, detta niður ímillum. Talan kann vera um mál, sum av ymiskum orsøkum eru viðkomandi fyri bæði eftirlitini, men sum bert hava verið til viðgerðar í øðrum.

2. *Samlað eftirlit í aðalráðnum*

Verður kommunala eftirlitið samlað aftur, undir leiðslu av einum myndugleika, kann hugsast, at ein meira ítøkilig kommunudeild hómast. Kommunala eftirlitið sum ein ítøkilig eind kann viðføra, at eftirlitið gerst lættari at raðfesta. Harumframt kann samstarvið í millum tað fíggjarliga og rættgildiga eftirlitið verða sterkari og betri samskipað, um hesi rúmast saman. Hetta kann eitt nú hava týdning í sambandi við tulkingarspurningar, og møgulig eftirlitismál fyri bæði ta fíggjarliga- og rættargildisliga eftirlitið.
Ein vansi við hesari skipan er, at neyðugt verður at uppbyggja servitan í eftirlitinum, sum er tøk aðrastaðni í miðfyrisitingini.

3. *Eftirlitið samlað, sjálvstøðug eind knýtt at aðalráðnum*

Ein háttur er, at skipa kommunala eftirlitið samlað, sum ein eind, knýtt at aðalráðnum, á sama hátt, sum til dømis lønardeildin er skipað undir Fíggjarmálaráðnum.

Á henda hátt kann aðalráðið fasthalda serliga vitan innan kommunal viðurskifti. Tað verður eisini mett, at vera ein tignarligur fyrimunur at hava eftirlitsmyndugleikan knýttan at einum aðalráði, og merkir hetta, at kommunurnar møguliga taka eftirlitið í enn størri álvara. Hetta er eisini galdandi fyri møguleika 1 og 2.

Á sama hátt kann eftirlitsmyndugleikin møguliga framhaldandi ávirkast politiskt, um tað liggur sum eind, knýtt at einum aðalráði. Royndirnar hesi mongu árini eru annars, at landsstýrisfólkini hava verið dugnalig, at halda armslongd til tað kommunala eftirlitið, soleiðis at arbeiðið ikki verður ávirkað av politikki. Armslongd verður møguliga styrkt, undir eini tílíkari skipan. Sum nevnt fastheldur aðalráðið serliga vitan, sum frammanundan hevur verið í ráðnum, í mun til, um tað kommunala eftirlitið verður skilt út til ein stovn. Soleiðis sum støðan er í dag, verður hetta ikki mett at vera ein avbjóðing, orsakað av teimum mongu broytingunum, sum hava verið innan málsøkið. Hetta er somuleiðis eisini komið fram undir samrøðunum at, *"at eingin servitan er at missa, soleiðis sum tað kommunala eftirlitið sær út í dag"*.

4. *Eftirlitið uttanhýsis – til ein stovn*

Um kommunala eftirlitið verður skilt út úr aðalráðunum til ein stovn sum ein samlað eind, verður vandin fyri politiskari ávirkan minni, hóast at hetta í verandi líki ikki er ein týðandi avbjóðing. Í einari tílíkari skipan verður møguleiki fyri, at aðalráðið kann virka sum kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá tí kommunala eftirlitinum. Undir verðandi skipanarhátti, eru avgerðirnar hjá myndugleikanum endaligar. Hetta er ein fyrimunur í mun til omanfyri nevndu skipanarhættir.

Um støða verður tikin til at skipa eftirlitið sum knýtt at einum stovni í staðin fyri at einum aðalráði, er spurningurin, hvar tað skal skipast undir. Tað tykist ikki at vera nakar stovnur, har kommunala eftirlitið natúrligt kann skipast undir. Í Danmark er eftirlitið við kommununum skipað undir

Ankestyrelsen, og hetta samsvarar á ein hátt við Føroya Kærustovn. Aðrir møguleikar kunnu vera Gjaldstovan, Umhvørvisstovan, og Vinnustovnurin ella Løgtingið.

Hildið verður, at kommunala eftirlitið er ein ov lítil organisatión, at skipa sum sjálvstøðugur stovnur. Tískil verður hesin møguleiki ikki viðgjørdur nærri.

*Samanumtøka*
Fyri at fáa skipanir at virka er neyðugt at orka til at skipa og loysa uppgávurnar er til staðar, og at økið verður raðfest.

Støðan í løtuni er, at tað kommunala eftirlitið er farið frá at hava umleið tvey til trý ársverk til í løtuni at hava undir eitt ársverk samlað at fyrisita økið (sí talvu 2 á síðu 8).

Avleiðingin av hesum er, at tað kommunala eftirlitið ikki í nøktandi mun kann føra eftirlit við kommunum.

Hóast ymisku skipanarhættirnir hava sínar fyrimunir og vansar, er avgerandi at neyðug arbeiðsorka er at røkja uppgávurnar í kommunala eftirlitinum.

## 6.0 Út frá omanfyri standandi gera tilmæli um, hvussu kommunala eftirlitið framyvir verður skipað, undir hvørjum myndugleika, ella myndugleikum.

Tað eru ongar royndir at skipa kommunala eftirlitið uttanfyri aðalráð. Í tílíkari loysn er tað ein fyrimunur at samskipa kommunala eftirlitið, tað rættargildiga og tað fíggjarliga. Á henda hátt er eindin fullfíggjað. Ein tílík eind kann skipast, eins og til dømis lønardeildin er skipað, undir leiðslu av Fíggjarmálaráðnum, við sjálvstøðugum rakstrarstaði. Við hesum kann hugsast, at eftirlitið við tíðini verður eitt betur skipað eftirlit, har skiftandi broytingar í sambandi við løgtingsval, ikki í sama mun, sum tað higartil hevur gjørt, ávirka tilfeingið, í mun til eftirlitið.

Ein tílík eind, sum nevnd omanfyri, kann eisini leggjast til ein stovn, tað vil siga til annan myndugleika enn til eitt aðalráð. Um eftirlitið verður fyrisitið av øðrum myndugleika, kunnu millum annað tulkingar, í sambandi við prinsipiell mál leggjast fyri aðalráðið/landsstýrisfólki, at taka støðu til. Harumframt fæst ein kærumyndugleiki afturat.

Er ynski um at kommunala eftirlitið skal verða meira sjónligt, og styrkja støðuna, sum eitt forvirkið og samvirkandi eftirlit, so er tað av stórum týdningi, at kommunala eftirlitið verður hægri raðfest. Búskaparliga gongdin hjá kommunum og landinum síðani ár 2000, vísur stóran vøkstur í kommunala búskapinum, og at fleiri týðandi uppgávur eru lagdar til kommunurnar at taka sær av, meðan starvsfólkaorkan er minkað. Uppgávurnar hjá eftirlitinum eru nógvar í vavi, men tilfeingið at fyrisita økið, er ikki tilsvarandi.

Tað er tí ikki vist, at størsti tørvurin er á, at umskipa kommunala eftirlitið, her og nú, men at tað í høvuðsheitum snýr seg um, at uppraðfesta og hereftir skipa og samskipa eftirlitini betur.

Tí verður mælt til at:

- Kommunala eftirlitið verður uppraðfest við 1-2 ársverkum skjótast gjørligt.
- Eftirlitið hugsavnar seg um at fáa skipa viðurskifti um eftirlitið, og leggur ætlan fyri næstu árini.
- Kommunala eftirlitið hugsavnar seg um, at fáa ein meira forvirknan, kunnandi og ráðgevandi leiklut við millum annað at:
    - styrkja mannagongdir um málsviðgerðina
    - gera vegleiðingar
    - fær sett á á stovn eitt samanhangandi avgerðarsavn, frá ár 2000 og fram til í dag.
    - arbeiðir meira forvirkið við til dømis útvaldum fokusøkjum
    - hevur afturvendandi skipaðar fundir millum fíggjar- og rættargildiseftirlitið.
    - hevur afturvendandi skipaðar fundir við kommunur/kommunufelagið, í minsta lagi eina ferð um árið

Tilmælini stuðla undir greidleika í málsviðgerðini, og gera eftirlitið minni knýtt at persóni. Eisini er hetta við til at styrkja og vegleiða úti í kommununum, sum so aftur ger málsviðgerðina smidligari í eftirlitinum sjálvum.

## 7.0 Eru onnur viðurskifti, sum hava týdning, í mun til tað skipanarliga, at taka tað við.

Endamálið við einum kommunalum eftirliti, er betri fyrisiting í kommununum. Eitt vælvirkandi eftirlit kann vera við til at fremja eina fólkaræðisliga umrøðu av kommunala geiranum.

Høvuðsniðurstøðan í hesum ritinum er, at kommunala eftirlitið ikki er raðfest og er støðugt minkað, tí í verandi skipan eru tað allatíð onnur mál, sum fáa hægri raðfesting. Landsstýrisfólkini fyrisita ikki kommunurnar og tá er tað eisini lítil politiskur vinningur, við at brúka nógva orku til eftirlit, til at fyribyrgja feilir í einum øðrum geira.

Ein síðuviðmerking í hesum sambandi er, at ført hevur verið fram, at kommunur eiga at vera partur av einum fíggjarpolitiskum regluverki, sum er fyri allan almenna búskapin. Í praksis er tað tó lættari sagt enn gjørt, bæði tí at kommunurnar eru so ótrúliga ymiskar í støðd og virka so sjálvstøðugar. Ein byrjan hevði tó verið at skipa eitt eftirlit, so bæði almenningurin og landspolitiska skipanin gav kommununum gætur.

Úrslitið við verandi skipan er, at kommunurnar ofta liva eina friðarliga tilveru, sum ikki fær líka stóra rúmd í almenna rúminum, sum landspolitikkur fær.

Ein møgulig loysn kann vera at seta krav um árligar frágreiðingar. Hetta kundi verið knýtt saman við árligum aðalorðaskiftum í Løgtinginum um kommunurnar. Hetta hevði kraft, at neyðug orka var sett av til endamálið og kundi viðvirka til eina upplýsta almenna umrøðu av kommunala geiranum. Hetta er ein uppgáva, sum miðlarnir ofta hava trupult við at lyfta; møguliga tí grundleggjandi greiningararbeiði manglar.

Nakað sum í fleiri førum hevur verið frammi er spurningurin um, hvørt kommunalu roknskapirnir áttu at verið grannskoðaðir fyrisitingarliga saman við roknskapinum hjá landinum hjá landsgrannskoðanini.

## 8.0 Fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar av tilmælunum.

*Fyrisitingarliga*
Mett verður ikki, at tað er neyðugt við lógarbroytingum her og nú, fyri at seta tilmælini í verk, sum stuðla væl undir, at fáa greiðari karmar um kommunala eftirlitið.

*Fíggjarliga*
Mett er, at neyðugt er við um 1-2 ársverkum afturat fyri at fáa sett tilmælini í verk, sum verður mett at kosta umleið 1,5 mió. kr. Afturat hesum skal roknast við einari upphædd til at fáa stovnað eitt avgerðarsavn. Hetta er til møguligar KT-útreiðslur, og orku at fáa tað gjørt. Tað er trupult at meta um kostnað av hesum, men mett er ikki, at ein tílík skipan kemur at kosta nógv.

Um økið skal flytast úr aðalráðnum, skal rakstrarkostnaður av møguligum hølum ella annað, takast við eisini. Tað er ikki tikið við. Skal tað flytast til annan stovn, verður somuleiðis tørvur á ávísum rakstrarútreiðslum til stovnin av hesum.

Stóra avbjóðingin í mun til tann skipanarliða partin, at fyrisita kommunala eftirlitið, er manglandi raðfesting. Tað vil siga, manglandi manning at røkja uppgávurnar.

Er ynski um at kommunala eftirlitið skal verða meira sjónligt, og styrkja støðuna sum eitt forvirkið og samvirkandi eftirlit, so er tað av týdningi, at kommunala eftirlitið verður hægri raðfest. At eftirlitið fær skipa viðurskiftir, og at tilmælini verða sett í verk, so skjótt økið er mannað upp.